

## Feðgar á Fólkatingi

Radikalu tinglimirnir Niels og Morten Helveg Petersen er ikki teir einastu feðgarnir í Fólkatinginum longur. Á valinum fyrradagin vórðu feðgarnir Klaus og Nick Hækkerup valdir á sosialdemokratiska listanum á Norðursælandi. Klaus Hækkerup sat í Fólkatinginum undan valinum, meðan sonurin var borgarstjóri í Hillerød kommunu. Feðgarnir eru samdir um nógv, men teir eru ósamdir um donsku luttøkuna í krígnum í Afghanistan.



## Kravdu betri barnakor

Umleið 1.000 fólk gingu í gjár kravgongu í Nuuk, har tey kravdu, at politikararnir skulu taka neyðug stig fyri at bøta um korini hjá grønlendskum børnum. Fyrireikararnir fegnaðust um, at landsstýrið hevur skipað fyri einum upplýsandi átaki, men gjørdu vart við, at tað er ikki nóg mikið. Í sambandi við kravgonguna fingu landsstýrið og Nuuk kommuna 3.445 undirskrivtir frá fólki, sum kravdu, at grønlendsk børn skulu hava eitt betri lív enn nú.

# til stóru innrásina

harmast hesa misskiljing.

### Lógir og reglugerðir

Elin Heinesen sigur, at hon í samrøðuni vildi gera vart við, at vit í Føroyum á ein hátt vórðu tikin á bóli, tá Føroyar herfyri gjørdust oyggjaland nummar eitt - og at vit (les: okkara náttúra) kanska ikki eru nóg væl fyrireikað til at taka ímóti so nógvum fólki í senn.

- Eg setti soleiðis spurnartekin við, um vit eru til reiðar at møta teimum krøvum til vistfrøðiligog umhvørvislig viðurskifti í landinum sum heild - krøvum, sum helst fara at koma uttanífrá eftir National Geographic kanningina.

Hon sigur, at tað í hesum sambandi serliga er vistferðafólkini, hon hugsar um, sum í framtíðini væntandi fara at gerast fleiri og fleiri.

- Tá ið (vist)ferðafólk í veksandi tali fara at koma higar, kunnu tey gerast vónbrotin av okkum, um vit ikki gera nakað við náttúruverndina skjótt.

Elin sigur, at soleiðis, sum støðan er, hava vit fáar lógir og reglugerðir, sum eitt nú skulu verja náttúru okkara móti eini størri innrás av ferðafólki.

- Tað stendur einum og hvørjum frítt at ganga allastaðni í náttúruni og taka ella oyðileggja plantulív og órógva fugl og fæ. Tað eru heldur ongar lógir ella reglur, sum byrgja uppfyri, at ein og hvør ferðamaður ella ferðakvinna kann fara út at fiska so nógv, teimum lystir. Her er einki skipað eftirlit og einki krav um reinsan av útgerð, soleiðis at skjótt kann vera at spreiða oyðileggjandi sjúkur.

Hon sigur, at Føroyar hava heldur eingi náttúruøki, ið eitt nú eru friðað sum tjóðargarðar eftir altjóða reglum, eins og tey hava nógva aðrastaðni.

- Hesi viðurskifti minka um virðið hjá okkum sum ferðamannaland í eygunum hjá vistferðafólkunum, ið júst eru tey fólkini, sum leggja flest pengar eftir seg og hava mest virðing fyri náttúru og mentan. Tað eru tí hesi, sum vit eiga at leggja okkum eftir at fáa henda vegin, leggur Elin aftrat.

Hon heldur, at um ein nógv størri mongd av ferðafólki nú fer at koma henda vegin orsaka av nógvu umrøðuni, Føroyar fáa í hesum døgum, kunnu tey eisini skjótt koma til at oyðileggja tað virðismikla tilfeingi, vit hava at bjóða, um vit ikki ansa eftir - og tá kann tað vera so skjótt, at júst tað, sum ferðafólkini koma higar eftir, er horvið ella oyðilagt!

- Vit hava sæð, at slíkt er hent nógva aðrastaðni, tí tey ikki fyrireikaðu seg, og tað er syrgiligt, tá ið høvið var har. Eg vildi við mínum orðum ávara um, at vit her í Føroyum ikki gera somu mistøk sum onnur. Vit hava tíbetur møguleika fyri at gera tað betri og fyrireika okkum - áðrenn ta stóru innrásina, sigur Elin.

Hon heitir tí á myndugleikarnar, almennu fyrisitingina og vinnuna um at standa saman og gera nakað skjótt – og sjálvandi vil SamVit verða ein virkis partur í øllum hesum.

- Vit mugu seta orku og pening av til arbeiði at fyrireika okkum til at fáa fleiri ferðafólk, so vit fáa sum best burturúr. Vit eru noydd sum skjótast at gera lógir og reglur sum verja okkara náttúru, leggur Elin aftrat.

### Varðveita virðini

- Vit mugu hava nógv størri kunnleika til, hvat tað er fyri náttúrutilfeingi, vit hava í Føroyum - og hvussu vit verja tað. Tað er júst hetta tilfeingið, sum onnur hava áhuga fyri at koma higar at uppliva.

Hon sigur, at vit eitt nú mugu hava betri hagtøl um fuglasløg og plantusløg, vit mugu avmerkja hagagøtur, laga varðar, seta skelti upp og upplýsa, so fremmandafólk vita, hvar tey skulu ganga, og hvussu tey skulu bera seg at í náttúruni.

- Vit mugu eisini hava neyvar reglur fyri frítíðarfisking, sum tryggja bæði náttúru og vinnuna, ið skal liva av at veita frítíðarfisking til ferðafólk. Vit mugu gera, hvat vit kunnu fyri at byggja upp einari burðardyggari ferðavinnu sum heild – eini vinnu, sum er við til at varðvei-ta tey ómetaligu virði, ið kunnu "selja" Føroyar úti í heimi, soleiðis at vit eisini í framtíðini kunnu liva av hesum virðum í ferðavinnuni.

Elin vísir á, at vit hava ein sera góðan møguleika fyri, at ferðavinna veruliga kann gerast ein týðandi vinna í Føroyum – ein møguleiki, sum vit ikki mugu lata fara aftur við borðinum.

Hon sigur, at Magni Blástein, sum veitir havfiskingartænastur til ferðafólk, í síni framløgu á ráðstevnuni vísti á, at ein bátur, ið fiskar og selur fiskin fyri 600.000 krónur, kann tjena upp til heilar 3,6 miljónir krónur fyri júst somu nøgd av fiski, um fiskurin verður veiddur saman við ferðafólki og sleptur út aftur.

- Tá svimur fiskurin enn í havinum og kann fiskast umaftur og umaftur, umframt at stovnarnir ikki verða ovfiskaðir.

Tí setir Elin viðkomandi spurningin.

- Hvørjum bíða vit eftir?!

Hon segði, at SamVit er farið í holt við at leggja eina langtíðarstrategi fyri ferðavinnu í samstarvi við vinnuna, umhvørvisstovnar, felagsskapir og almennu fyrisitingina fyri at tryggja, at vit fáa sum best burturúr ferðavinnuni uttan at oyðileggja tilfeingið, sum ferðavinnan byggir á.

- Hetta var høvuðsendamálið hjá mær, og eg vóni, at vinnan samd við mær í hesum. Eg kann bara heita á fólk í vinnuni um heldur at hyggja at tí, sum veruliga hevur týdning. Samstarv er vegurin fram – og ikki misskiljingar millum tey, sum mugu samstarva fyri at gera vinnuna betri føra fyri teirri avbjóðing, ið liggur fyri framman. Uppgávan hjá mær er sjálvandi ikki at sáa split, men heldur at byggja brýr. SamVit hevur ongan annan áhuga enn at tæna vinnuni í Føroyum, og soleiðis eisini at samstarva við gistingarhús og matstovur - øllum at gagni, sigur hon.

Elin sigur, at SamVit fyrireikaði ráðstevnuna um vistferðavinnu fyri at vísa á, hví tað er skilagott - eisini fyri pengapungin - at uppbyggja eina burðardygga ferðavinnu í Føroyum.

Stjórin í SamVit sigur seg vóna at fáa eitt gott og íblásandi samstarv millum viðkomandi partar framyvir um at menna føroysku ferðavinnuna tann vistfrøðiliga og burðardygga vegin til gagns fyri náttúru, mentan og ikki minst fyri tey vitjandi og okkum í Føroyum, ið eru vertir hjá útlendsku gestunum.

- Um onkur hevur onkran spurning, onkra viðmerking ella onkur góð hugskot í hesum sambandi, eru tey altíð vælkomin til at venda sær til okkum í SamViti, sigur Elin Heinesen, stjóri.



*Magni Blástein, sum veitir havfiskingartænastur til ferðafólk, segði í síni framløgu á ráðstevnuni, at ein bátur, ið fiskar og selur fiskin fyri 600.000 krónur, kann tjena upp til heilar 3,6 miljónir krónur fyri júst somu nøgd av fiski, um fiskurin verður veiddur saman við ferðafólki og sleptur út aftur. - Tá svimur fiskurin enn í havinum og kann fiskast umaftur og umaftur, segði hann Mynd: Vilmund Jacobsen*